# Oljufeløg tosa við eini rødd

**At oljufeløgini nú taka seg saman í eitt slag av áhugafelag er fult í tráð við ynskið frá føroyskum myndugleikum um at kunna venda sær til eitt stað, har øll oljufeløgini eru umboðað sigur Halvor Snarvold, sum fer at standa á odda fyri nýggja føroyska oljuídnaðarbólkinum at byrja við**



*Halvor Snarvold, ein av útlendsku veteranum tá tað snýr seg um fyrireiking til eina føroyska oljuleiting.*

*Mynd Jan Müller*

OLJUFELØG Í FØROYUM

*Jan Müller*

Eitt av teimum útlendsku oljufeløgunum, sum hevur arbeitt longst við Føroyaøkinum og sum uttan iva hevur vitjað her oftast og havt mest við føroyskar myndugleikar at gera øll hesi seinastu árini tosað og arbeitt hevur verið við oljumálinum, man vera norðmaðurin Halvor Snarvold. Upprunaliga arbeiddi hann hjá Enterprise Oil, síðani hevur hann arbeitt fyrr Atlantic Margin Group og fyri Statoil, men í dag hevur hann sína egnu ráðgevandi fyritøku. Øll hesi seinastu árini hevur hann staðið á odda fyri GEM-starvinum, sum nú lutvíst verður avloyst av tí nýggja felagnum FOÍB. Tað verður helst Halvor Snarvold, sum kemur at standa á odda fyri hesum felagsskapi í byrjanini, men ætlanin er so, at onkur frá fyristøðufeløgunum verður formaður, og at onkur føroyingur so helst kann taka yvir sum frálíður.

Halvor Snarvold, ið greiddi umboðum fyri føroyskt vinnulív, almennar stovnar, myndugleikar og feløg frá nýggja felagsskapinum á fundi í útvarpshøllini í vikuni sigur, at talan er ikki um nakað arbeiðsgevarafelag fyri oljufeløg. Tað snýr seg um eitt sokallað »bransjufelag«, har mál av felags áhuga verða viðgjørd. Men tað skal so eisini taka sær av teimum mongu verkætlanunum frá GEM-samstarvinum, ið framvegis eru í gongd.

Halvor Snarvold sær ikki nýggja felagsskapin sum nakra mótvekt ella mótpol til føroyskar myndugleikar og vinnulív, har oljufeløgini skulu tryggja seg sjálvi og syrgja fyri, at tey fáa sum mest burtur úr. – Í slíkum felagsskapi kunnu vit sjálvandi tala við eini rødd, og tað kann gera alt meira einfalt bæði fyri feløgini men so sanniliga eisini fyri føroyskar myndugleikar og vinnulív.

Halvor Snarvold sigur annars, at hetta samstarvið millum oljufeløgini hevur verið væl og virðiliga viðgjørt saman við og viðmælt av føroyskum myndugleikum, sum hava ynskt at kunna fara til eitt ávíst stað at tosa við øll oljufeløgini og harvið kunna fáa tær samrøður, fundir og svar, sum tørvur er á. Eisini umboð fyri høvuðsvinnuna, fiskivinnuna hava sett fram ynski um at kunna fara til bara eitt stað, har øll oljufeløgini eru umboðað.



*Umleið 70 umboð fyri føroyskar stovnar, myndugleikar og vinnulív vórðu við á kunnandi fundinum í Útvarpshøllini í viku.*

## Ikki mótpolur

Hann heldur ikki, at føroyingar eiga at kenna hetta samstarvið sum nakra hóttan ella sum eina roynd hjá oljufeløgum, sum frammanundan eru risastór, at gerast enn sterkari mótvegis føroyskum myndugleikum. Tvørturímóti er ætlanin, at hetta forum skal vera við til at menna samstarvið og fremja dialogin millum myndugleikar og oljufeløgini. Í fleiri av teimum arbeiðsbólkunum, sum eru settir, eru tí eisini umboð fyri føroyskar myndugleikar. Nýggi felagsskapurin er eisini soleiðis bygdur upp, at oljufeløg, sum ikki hava leitiloyvi við Føroyar, men sum standa úti á síðulinjuni og fylgja við og t.d. kunnu hugsa sær at vera við í 2. útbjóðingarumfari, kunnu vera við í tveimum av arbeiðsbólkunum, sum hava við umhvørvi og hav/veður at gera. Sosialurin skilur, at fleiri av teimum heilt stóru oljufeløgunum, sum upprunaliga vórðu við í kanningunum av føroyska landgrunninum, møguliga vilja hava áhuga at vera við í hesum arbeiðsbólkunum. Hesi kunnu vera ExxonMobil, Shell, Texaco, TotalFinaElf og uppaftur onnur.

Enn fyriliggur tó einki ítøkiligt um, at hesi feløgini eru á veg inn aftur í føroyska økið, tó at okkurt felag skal hava spurt seg fyri.

Halvor Snarvold vil ikki siga nær føroyingar áttu at skipað fyri enn eini útbjóðing. Fyrst mugu hesir 8 brunnarnir verða boraðir tvs. áðrenn 2003. – Persónliga vildi eg hildið, at eitt nýtt umfar so kundi komið eftir tað, men tað vil eg helst ikki leggja meg út í, tí tað er ein føroysk avgerð.

Ein felagsskapur sum FOÍB er eindømi í hesum parti av heiminum. Halvor Snarvold kennir ikki til nakað líknandi tað hann veit um. FOÍB er tí nakað serføroyskt, sum er skræddaraseymað út frá føroyska samfelagnum, umhvørvinum og tí tørvi, sum er her. Tvs. at man hevur eisini tikið við tær royndir, sum eru gjørdar aðrastaðni við líknandi felagsskapum. Tikið tað besta við og solda tað minni góða frá. Í Bretlandi hevur tú eisini ein felagsskap fyri oljufeløg men tað er bara fyri fyristøðufeløg (operatørar), og tað sama er galdandi í Noregi. Hetta er tí fyrstu ferð, at tú skipar ein felagsskap fyri oljufeløg, sum hava leitiloyvi og har tú sum sagt ikki skilur millum fyristøðufeløg og hini oljufeløgini, ið eru við.



# Føroyar væl fyrireikaðar til oljuleiting



*Føroyska manningin, sum stendur á odda fyri komandi oljuleiting: Ben Arabo, Amerada Hess, Hjarnar Djurhuus, BP, Rúni Hansen, Statoil, Johan Mortensen, Anadarco og Ingi Højgaard, Agip.*

*Mynd Jan Müller*

**– Tað eru fá pláss í heiminum, sum eru so væl fyrireikað til eina oljuleiting sum Føroyar. Og verður olja funnin, so eiga føroyingar ikki at taka hana í land her. Sleppið undan stórum tangaskipum við strendurnar og takið heldur pengar inn um skattaskipanina sigur Halvor Snarvold, royndur oljumaður**

FØROYINGAR OG OLJA

*Jan Müller*

Nú Halvor Snarvold, professionellur oljumaður í eitt mannaminni, lítur aftur um bak heldur hann, at tað hevur verið ein sera skilagóð og heppin útviklingur í allari tilgongdini til ta leiting, sum nú fer at byrja í Føroyum. Hann hevur eisini varhugan av, at føroyskir myndugleikar eru sera fegnir um nógv av tí arbeiði, sum gjørt er í t.d. GEM. – Alt tað tilfarið, sum er gjørt í sambandi við GEM, verður nú brúkt í tilrættaleggingini av komandi boringum. So tað hevur riggað væl.

Halvor Snarvold heldur tað ikki vera at taka munnin ov fullan at siga, at Føroyar sum samfelag eru kanska nógv betur fyrireikaðar til eina komandi leiting enn nakað annað øki í heiminum, sum er farið undir leiting. Her hugsar hann so serliga um tey fakligu økini, ið hava beinleiðis við komandi boringar at gera. Uppá fyrispurning um vit í Føroyum hinvegin ikki eru ov sein á sjóvarfallinum, tá tað ræður um at umrøða tær meira samfelagsligu, mentanarligu og sosialu avleiðingarnar av eini leiting heldur Halvor Snarvold, at hetta orðaskiftið kemur ikki ov seint, tí avleiðingar av hesi vinnu fer tú ikki at merkja fyrr enn tú hevur funnið nógva olju og skal til at byggja út stór felt. Og eftir øllum at døma ganga tað enn nøkur ár, áðrenn vit síggja eina veruliga framleiðslu á føroyskum øki.

## Onga olju til Føroya

Tá vit spyrja Halvor Snarvold um hansara persónligu meining um hetta at skula gera av, um oljan skal í land í Føroyum ella ikki, tá er hann rættiliga avgjørdur. – Mín meining er tann, at tit eiga als ikki at taka olju ella nakað, sum hevur við hana at gera í land í Føroyum. Tað er nógv léttari og betri at fáa pengarnar inn um skattaskipanina heldur enn at skula hava stór tangaskip siglandi við strendurnar og harvið verða ein álvarslig umhvørvislig hóttan og til bága fyri fiskivinnuna.

Halvor Snarvold telist ikki millum teirra, sum bera ótta fyri avleiðingunum av eini oljuvinnu. Hann heldur, at fyrireikingarnar hava verið sera skilagóðar. –Eg haldi føroyingar eru alt ov intellegentir til at enda í eini “Kuwaitstøðu”, har pengarnir floyma inn í samfelagið og taka yvirhond. Tað skal ein oljugrunnur m.a. forða fyri.

# Føroya Oljuídnaðarbólkur settur á stovn

SAMSTARV MILLUM OLJUFELØG

*Jan Müller*

Á fundi í Keypmannahavn í januar í ár varð Føroya Oljuídnaðarbólkur settur á stovn. Hesin bólkur er ein avloysari ella uppfylging til GEM, sum hevur verið eitt tætt samstarv millum oljufeløgini og eisini føroyskar myndugleikar.

Týsdagin var kunnandi fundur um nýggja felagsskapin. Boðin vórðu umboð fyri ymsar føroyskar stovnar og feløg

Tað eru teyt 12 oljufeløgini, sum hava fingið loyvi at leita eftir olju á Føroyska økinum, sum hava sett á stovn Føroya Oljuídnaðarbólk, FOÍB.

Endamálið við Føroya Oljuídnaðarbólki er millum annað at skapa ein virknan miðdepil fyri umrøðu og semjun av felags áhuga sigur Atlanticon, sum verður skrivstova hjá nýggja felagsskapinum í kunningarskrivi.

Víst verður á, at tað við stovnanini av FOÍB fæst til vega eitt forum, ið kann samskifta við føroyskar myndugleikar um týðningarmikil mál og operatiónsspurningar. FOÍB tekur við eftir GEM samstarvið, og tað arbeiði sum er útinnt í samband við fyrireikingarnar til teir fyrstu leitibrunnarnar.

Høvðusparturin av tí innleiðandi arbeiðinum hjá FOÍB verður menning av eini felags kós fyri at fremja møguleikan hjá føroyskum veitarum í kapping at veita vørur og tænastur til frálandavinnuna. FOÍB fer eisini at tryggja at felags verkætlanir verða framdar og at úrslitini verða væl og virðiliga lýst. Umframt hetta vil FOÌG halda fram við tí samskipaðu gongd í umhvørvismálum, sum var sett í verk av GEM.

FOÍB er skipað í fimm arbeiðsøkir sum umfata:-

- Umhvørvi
- Operatión & Verkfrøði (fevnur eisini um Metocean)
- Operationell HTU (heilsu, trygd og umhvørvi)
- Leiting & Geoteknikk
- Vinnulig & Løgfrøðilig Mál

Formennirnir í teimum fimm undirbólkinum eru fylgjandi:

Umhvørvi
Arne Myhrvold, Statoil
Operatión & Verkfrøði
John Thorogood, BP
Operatioinell HTU
Paolo Linzi, Agip

Leiting & Geoteknisk
Stephen Linnard, Anadarko

Vinnuligt & Løgfrøðiligt
Ben Arabo, Amerada Hess

Loyvini, ið vórðu givin í fyrsta útbjóðingarumfari, vórðu kunngjørd í august 2000 av Føroya Landstýri. Tey 12 feløgini, ið fingu loyvini í útbjóðingarumfarinum og sum eru virkandi í FOÍB, eru:

- Agip
- Amerada Hess
- Anadarko
- Atlantic Petroleum
- BG
- BP
- DONG
- Enterprise
- Føroya Kolvetni
- Phillips
- Statoil
- Veba

GEM samstarvið, sum nýggja FOÍB í ávísan mun byggir víðari á, varð annars stovnað í samráð við Føroya Landstýri, stovnar og fyritøkur fyri at fremja ætlanir innan geoteknisk-, umhvørvis- og metoceanøkir fyri at geva vinnuni nóg mikið av økisvitan til at verða før fyri at byrja boringina av teimum fyrstu leitingarbrunnunum á ein tryggan hátt og við atliti til havumhvørvið kring Føroyar. Hetta arbeiði varð seinni víðkað til eisini at umfata trygd og tilbúgving.

Meira kunning fæst annars við at venda sær til Atlanticon, ið verður sekretariat hjá FOÍB. Hilmar Eliassen, Atlanticon, Tel. + 298 31 96 85

**FAROES OIL INDUSTRY GROUP - FOÍB**
**SCOPE AND OBJECTIVES**

- To provide a forum to discuss and agree common policies on Faroese participation, HSE, operational and related issues

- Provide a forum for industry communication with the Faroese Authorities and other interested parties

- To collaborate in acquiring data where this is of benefit to all Licensees

- To identify areas for the efficient use of resources in relation to operations in Faroese waters

- To manage joint projects funded under the terms of individual licences

- To act as caretaker for the conclusion of outstanding GEM activities

53a 28th February 2001

**FAROES OIL INDUSTRY GROUP - FOÍB**

